**Eilen Anthoniussen**
eilen@sosialurin.fo



GLAÐIR pensionistar



*Eilif Samuelsen nýtir tað mesta av síni tíð á loftsskrivstovuni, har hann týðir útlendskar bøkur til føroyskt. Hann hevur ikki minni enn tvær teldur at arbeiða við.*

# Fartelefonin er mín lummabók

**74 ára gamli Eilif Samuelsen er ein sera virkin pensionistur. Síðan hann gavst at arbeiða sum lærari í 2002, er hann farin at brúka tíðina til at týða bøkur, sum er hansara stóri áhugi. Hann leitar sær javnan út á bygd at skriva, og hjá sær hevur hann altíð fartelefonina, sum virkar sum lummabók. Og so dámar honum eisini væl at halda samband við vinir, familju og gamlar næmingar umvegis Facebook**

Í hugnaliga umhvørvinum á Kráarvegi í Havn, situr ein maður á sínum lofti og arbeiðir. Tað er 74 ára gamli Eilif Samuelsen. Millum bunkar av bókum og báðar teldurnar situr hann og skrivar. Skrivstovan á stóra loftinum er prýdd við gomlum minnum, har myndir av familju taka nógv pláss á veggjunum, oman fyri fyltu bókahillarnar. Myndirnar vísa millum annað stóra systkinaflokkin hjá Eilifi Samuelsen. Hann varð føddur í Fuglafirði, og er hann partur av systkinaflokki, ið telur 12. 10 beiggjar og tvær systrar. So hvørt sum dreingirnir gjørdust eldri, fóru teir til Havnar at læra á familjufyritøkuni, Dimmalætting.

- Men eg slapp onkursvegna undan. Eg fór til Danmarkar at ganga á háskúla, og fór beint eftir á Haslev Seminarium at ganga, har eg fekk læraraprógv í 1958, sigur Eilif Samuelsen.

Afturkomin úr Danmark, fór Eilif Samuelsen til Fuglafjarðar at starvast sum vikarur í eitt ár, síðan til Hvalvíkar at arbeiða í seks ár, Kommunuskúlan í trý ár, og tá Venjingarskúlin byrjaði, fór hann har at arbeiða, og har undirvísti hann fram til 2002. Eilif Samuelsen spesialiseraði seg í donskum máli og bókmentum og í pedagogiskari sálarfrøði á Danmarks Lærerhøjskole, og undirvísti hann øll árini í donskum, bæði í fólkaskúlanum og á Læraraskúlanum.

- Eg varð pensioneraður í 1999. Men mær dámdi so væl at vera lærari, og tá ið tørvur var á lærarakreftum, helt eg fram í trý ár aftrat. Tá eg so gavst, saknaði eg arbeiðið, sigur Eilif Samuelsen.

## Floksdisiplinið er upphevað

At hann saknaði at vera partur av dagliga resinum, er ikki løgið. Umframt at arbeiða sum lærari, var Eilif Samuelsen formaður í Lærarafelagnum í 12 ár. Hann varð eisini valdur inn á ting í 1978, har hann sat fram til 1990. Tvær reisur sat hann sum landsstýrismaður, í tíðarskeiðunum 1980-84 og 1994-98.

- Tað politiska fylti kolossalt. Tá var eg upptikin døgnið runt av einhvørjum í samband við tingarbeiði. Tað var rættiliga upplagt, at eg skuldi fara upp í politikk. Familjan er sambandsfamilja, og tað varð nógv tosað um politikk heima hjá okkum. Men eg má siga, at tað er øðrvísi at eygleiða politiska arbeiðið í dag.

Hann samanber tingarbeiðið í dag við gamlan sið í tinginum.

Floksdisiplinið var nógv sterkari fyrr. Í dag tykist, sum tað er fullkomiliga upphevað. Hvør limur kann føra sín egna politikk, og profilera seg sjálvan heldur enn at fremja tað, sum flokkurin stendur fyri. Og tað er eitt afturstig. Tað darvar arbeiðinum og ger tað torført hjá formonnunum at gera avtalur um støðutakan til málini. Vit hava sæð so nógv dømi um, at ósemjur tendera til klandur, og tað er destruktivt fyri arbeiðið. Avleiðingin er, at ov fá úrslit spyrjast burtur úr. Fyrr avmarkaðu politikarnir seg meira til at profilera seg sjálvar og flokkin teir seinastu mánaðirnar av valskeiðinum.

## Sunt likam er ein skylda

Eftir ein krevjandi gerandisdag vendi Eilif Samuelsen til eina friðarliga tilveru á Kráarvegi í Havn. Tað var í 1966 at hann og konan fluttu inn í húsini á Kráarvegi, sum eru væl hildin við einum vøkrum urtagarði og eini spildurnýggjari terassu í túninum. Tey eiga tvey børn, fýra abbabørn og eitt langabba- og langommubarn. Um páskirnar giftist elsti abbasonurin í Italia, har familjan var hjástødd. Evropa er ikki fremmant fyri Eilif